## Jón Pauli skal venja VB/Sumba

VB/Sumba hevur sett Jón Paula Olsen sum venjari hjá 1-3. deild og unglingum, skrivar heimasíðan hjá VB. Jón Pauli hevur í tvey ár verið venjari hjá dreingja- og unglingaliðnum hjá VB/TB, har tað teir hava fingið góð úrslit. Dreingirnir hava vunnið FM tvey ár á rað. Jón Pauli er eisini byrjaður á venjaraútbúgvingini, sum FSF skipar fyri. Í september tók hann UEFA B prógvið.



# Bjørnin skotin og skinnið selt

**Føroyameistararnir úr Klaksvík møttu toppliðinum úr Vestmanna, og hóast FM bjørnin hevði styrkt liðið, varð skinnið selt fyri ein 3-1 sigur til Vestmanna**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Seinasta umfarið í fyrru hálvu í heimligu talvkappingini varð telvað í vikuskiftinum.

### Steintór og Rødgaard á 1. borði

Steintór Rasmussen hevur ikki telvað við á fyrsta liði fyrr í ár, og tí vónaðu klaksvíkingar at nýta hann til at taka vestmenningar á bóli, tí tað kundi verið, at vestmenningar ikki høvdu fyrireikað seg uppá hetta liðið.

Talvið varð sett í gongd kl. 14, somu tíð sum Fríðriksson varð vígdur bispur. Hetta gjørdist eitt sera friðarligt talv, og teir báðir samdust skjótt um javnleik. Um talvið varð ávirkað av bispavígsluni er ilt at siga, men friður valdaði yvir borðinum, og tá talvið varð liðugt, vóru allir bisparnir enn á borðinum.



*Steintór og John gjørdu skjótt av við einum stórmeistara javnleiki*

### Carl Eli og Ólavur á 2. borði

Talvið var eftir bókini teir fyrstu 12. leikirnar, og tá varð støðan sera jøvn. Støðan hjá Carl Eli varð tó eitt sindur lættari at spæla enn hjá klaksvíkinginum, tí Ólavur hevði eina veika finnu á miðjuni á borðinum. Eftir drúgva tíðarneyð, bjóðaði Carl Eli javnt í einari fløktari støðu. Carl Eli hevði tó møguleikan at seta trýst á Ólav, men sá ikki avgerandi leikin í tíðarneyðini, og tí endaði talvið við javnleiki.

### Finnbjørn og Martin á 3. borði

Martin Brekká hevur telvað við vestmenningum, eftir at talvfelagið við Streymin tók seg úr kappingini í fjør.

Finnbjørn legði væl út, og við einum bispaoffri í 12. leiki fekk hann greiðan fyrimun. Martin tók annað skinn um bak og kastaði alt, sum hann hevði, eftir bjørnini. Brekkan gjørdist ov tung, og bjørnin fann ikki røttu leikirnar, og endin varð, at Martin fór avstað við heila stiginum.

### Samson og Rani á 4. borði

Samson Højgaard, ið telvar fyri vestmenningar, legði hart út við kongabragdi, og lat ein rók fyri ein riddara móti Rana Nolsøe. Talvið gjørdist rættiliga vilt, og Samson vísti, at styrkin lá á talvborðinum og ikki í hárinum. Hann fekk eitt øgiligt álop, sum Rani ikki megnaði at halda aftur, og endin varð, at Rani misti tamarhaldið á støðuni og gav tí stigið.

Hervið vunnu vestmenningar 3-1 og liggja nú trý stig frammanfyri fyrsta liðið hjá klaksvíkingum í stríðnum um FM heitið.

### Ein onnur bjørn vaknað

Havnin vann tryggan sigur á øðrum liði hjá Klaksvík. Vert at býta merki í, at Helgi D. Ziska var at síggja á havnarliðinum, og er hetta fyrsta talvið hjá honum í liðkappingini. Helgi vann sítt talv móti Haldur S. Johansen, og samanlagt vann Havnin 3½-½. Undrunarvert er, at Helgi er settur á annað borð hjá havnarliðinum aftanfyri Martin Poulsen, hóast Helgi næstan er 100 ratingstig frammanfyri Martin.

Triðji dysturin í 1. deild var millum annað liðið hjá vestmenningum og Sandavág. Her vann Sandavágur 3-1, og eru teir á triðja plássi bert 1½ stig aftanfyri fyrsta liðið hjá Klaksvík.

| 1. deild | Stig |
|---|---|
| Vestmanna 1 | 16 |
| Klaksvík 1 | 13 |
| Sandavágur | 11½ |
| Havnin | 8½ |
| Klaksvík 2 | 6½ |
| Vestmanna 2 | 4½ |
| | |
| **2. deild** | |
| Havnin 3 | 14 |
| Toftir | 11½ |
| Kollafjørður | 11 |
| Havnin 2 | 9½ |
| Klaksvík 3 | 8½ |
| Sandavágur 2 | 5½ |
| | |
| **3. deild A** | |
| Vestmanna 3 | 14 |
| Skopun | 10½ |
| Sandavágur 3 | 9 |
| Klaksvík 4 | 6½ |
| | |
| **3. deild B** | |
| Havnin 4 | 11½ |
| Rókur | 11 |
| Gøta | 11 |
| Vestmanna 4 | 6½ |
| | |
| **Unglingar** | |
| Rókur | 10 |
| Klaksvík | 9½ |
| Vestmanna | 8 |
| Havnin | 6½ |
| Sandavágur | 6 |

## Triðja GP-umfar í borðtennis avgreitt

**Leygardagin var triðja umfar í Grand prix-kappingini avgreitt, tá ið 65 leikarar úr fýra ymiskum feløgum møttu upp til kapping í Eysturskúlanum í Havn**

BORÐTENNIS
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Seinasta almenna borðtenniskappingin í hesum árinum er spæld. Hetta hendi leygardagin í Havn, tá ið heldur fáir leikarar møttu upp.

### Javnt í oddanum

Nú trý umfør eru leikt av árligu Grand prix-kappingini, sum telur seks umfør, er sera javnt og spennandi í oddanum. Altvinnandi Petur Niclasen úr Borðtennisfelagnum Tór í Havn, hevur í ár fingið nógva mótstøðu.

Í samlaðu støðuni liggur hann á odda saman við 16 ára gamla Róa Agnarsson, somuleiðis úr Tór, og eru teir bara 20 stig frammanfyri Ragnar Egilsson, sum eisini er úr havnafelagnum.

Leygardagin vann Rói 3-2 á Peturi, men tað var tó Petur, ið tók fyrsta plássið. Tað var bara eitt sett í settmuninum, ið skilti teir báðar.

### Talent ávegis

Bara 13 ára gamli Heini Mortensen úr TBF, Tvøroyrar Borðtennisfelag, var leygardagin at finna í B-bólkinum. Hetta er sera langt rokkið av einum so ungum leikara, og fara vit óivað at hoyra meira til hansara í framtíðini. Heini gjørdist nummar seks av átta leikarum í bólkinum, og megnar tískil at halda seg í bólkinum.

**Bólkavinnarar gjørdist:**
A Petur Niclasen, Tór
B Pætur Albinus, Tór
C Ólavur Niclasen, KÍ
D Eyðun Ellendersen, Royn
E Birita Mortensen, TBF
F Anna Mikkjalsdóttur, TBF
G Janus Midjord, Royn
H Annbritt Holm, Royn
I Borgar Debes, Tór

*Samlaða støðan í Grand Prix kappingini eftir 3. umfar:*

**Smápinkur**
1. Sofía Maria Ferjá, TBF – 244 stig
2. Durita Jensen, TBF – 226 stig
3. Sissal Jespersen, TBF – 180 stig

**Smápiltar**
1. Hávar Albinus, TBF – 216 stig
2. David Mortensen, TBF – 158 stig
3. Aksel Kallsberg, Tór – 88 stig

**Pinkur**
1. Anna Mikkjalsdóttur, TBF – 360 stig
2. Lív Øster, TBF – 300 stig
3. Vár Holm, TBF – 178 stig
3. Gunnvá Mortensen, TBF – 178 stig

**Piltar**
1. Hans Jón Jacobsen, TBF – 380 stig
2. Knútur Jóanesarson, Tór – 330 stig
3.Sveinur Nolsøe, Tór – 270 stig

**Smágentur**
1. Birita Mortensen, TBF – 460 stig
2. Marin Sofía Brattalíð, TBF – 350 stig
3. Sára Hentze, TBF – 270 stig

**Smádreingir**
1. Heini Mortensen, TBF – 710 stig
2. Mathias Mortensen, TBF – 640 stig
3. Sverri Jacobsen, TBF – 540 stig

**Gentur**
1. Rakul Mikkjalsdóttur, TBF – 770 stig

**Dreingir**
1. Fróði Jensen, TBF – 810 stig
2. Páll Heri Nolsøe, TBF – 620 stig
2. Tórur Dahl, Tór – 620 stig

**Kvinnuunglingar**
1. Susie Midjord, TBF – 340 stig

**Mansunglingar**
1. Rói Agnarsson, Tór – 970 stig
2. Hallur Thorsteinsson, Tór – 900 stig
3. Pætur Albinus, Tór – 790 stig

**Kvinnur**
1. Marin í Dali, TBF – 790 stig

**Menn**
1. Petur Niclasen, Tór – 970 stig
2. Ragnar Egilsson, Tór – 950 stig
3. Fríði Jensen, TBF – 790 stig